

# Mánaðarbræv

**Sendistova Føroya til Íslands**

**Mai 2017**

## FUNDIR, TILTØK O.A. Í JUNI, M.A.:

**1. juni** bjóðar kanadiski sendiharrin at vitja kanadiska flogherin í Keflavík, sum í løtuni røkir íslendska loftrúmið.

**6. juni** til móttøku hjá svenska sendiharranum í sambandi við svenska tjóðardagin.

**9. juni** til móttøku hjá russiska sendiharranum í sambandi við "National Day of Russia".

**12. juni** fund við Reykjavíkar kommunu um Menningarnótt.

**13. juni** til móttøku hjá bretska sendiharranum í sambandi við føðingardagin hjá ensku drotningini.

**15. juni** til fund um ávirkanina av Brexit á íslendska búskapin til lands og vatns, sum íslendska Fiski- og landbúnaðarmálráðið skipar fyri.

**16. juni** til kunning um íslendskan uttanríkispolitikk hjá ísl. uttanríkisráðharranum.

**17. juni** luttaka í tiltøkum í sambandi við ísl. tjóðardagin (Dómkirkjan, døgurði hjá ísl. uttanríkisráðharranum og móttøka hjá forsetanum)

**28. juni** til móttøku hjá kanadiska sendiharranum í sambandi við 150 ára dagin hjá Kanada.

## UTTANRÍKISPOLITISKA FRÁGREIÐINGIN

Fyrst í mai mánaði legði Guðlaugur Þór Þórðarson uttanríkispolitisku frágreiðingina fyri Altingið. Frágreiðingin vísir nágreiniliga á, hvørji framtíðar mál og ætlanir, uttanríkisráðið hevur.

Guðlaugur Þór Þórðarson, uttanríkisráðharri, segði m.a.

> *»Uttanríkistænastan er okkara sterkasta vápn, tá tað snýr seg um at verja áhugamál okkara í einum heimi í støðugari broyting. Vit mugu regluliga hvessa hetta amboð, so tað tænir sínum endamáli«*

Ein nýggj meting er gjørd av arbeiðinum, raðfestingini og endamálinum hjá uttanríkisráðnum. Kanningin verður ætlandi liðug í heyst og er ætlað at vera leiðreglur fyri uttanríkisráðið fyri komandi ár.

Í røðuni, legði uttanríkisráðharrin serliga dent á fýra øki: trygd og verju, nýggjar avbjóðingar innan uttanríkishandil, týdningin av burðardyggari nýtslu av náttúrutilfeingi og umhvørvi og nýggja visjón fyri menningarsamstarv.

Innan *verju og trygd,* kom uttanríkisráðharrin m.a. inn á NATO. Har hevur Ísland lagt dent á spurningin viðv. Norðuratlantshavinum og havtrygdini, eins og verju og ráðlegging fyri økið. Verja av loftrúminum verður óbroytt og síðan 2007 hava tilsamans níggju lond framt 26 eftirlitsuppgávur. Talið av sivilum serfrøðingum, sum arbeiða fyri NATO, er økt og Ísland hevur økt um trygdina í trygdarøkinum í Keflavíkar floghavn. Tikið verður lut í tveimum víttfevnandi NATO venjingum (á sumri 2017 og á heysti 2018).

Tá talan er um *Uttanríkishandil,* hava serliga framtíðar viðurskiftini millum Ísland og Bretland høga raðfesting. Tørvur er á at sundurgreina týdningarmestu áhugamálini í hesum sambandi. Samrøður við bretsku myndugleikarnar, EFTA-londini og ES eru longu byrjaðar. Stórur tørvur er á at styrkja arbeiðið hjá Íslandi innan EFTA og EBS. Samstarvið í EFTA er ein grundleggjandi táttur í handilspolitikkinum hjá Íslandi. EFTA-londini hava tey seinastu árini styrkt um fríhandilsnetið, sum nú fevnir um 38 lond. Ísland leggur áherðslu á, at EFTA skjótast gjørligt byrjar samráðingar um fríhandilsavtalur við lond, sum hava stóran týdning fyri íslendskar útflytarar. Gjøgnum EFTA eru samráðingar í gongd við týðandi lond, sum t.d. India, Vjetnam, Indonesia og Malaisia og samrøður við

suðuramerikanska Mercosur blokkin (Argentina, Brazil, Paraguay, Uruguay og Venezuela) eru um at fara í gongd.

*Á umhvørvisøkinum og innan Arktis*. Ein av hornasteinunum í tí íslendska uttanríkispolitikkinum er at verja tað arktiska økið. Áhugi Íslands í stríðnum móti veðurlagsbroytingunum, kemst serliga av árinunum, veðurlagsbroytingarnar hava á havið og lívhválvið kring Ísland.



*Mynd 1. Guðlaugur Þór Þórðarson, uttanríkisráðharri*

Guðlaugur Þór Þórðarson nevndi, at Ísland hevur formansskapin í Arktiska Ráðnum frá 2019 til 2021 og er hetta ein gyltur møguleiki hjá Íslandi at styrkja sítt altjóða pláss á hesum økjum. Ísland kann gerast meira virkið í altjóða samstarvinum um at verja umhvørvi, burðardygd og støðufesti og á hendan hátt verja síni egnu langtíðar mál.

*Menningarsamstarv*. Altjóða mál hjá ST fyri burðardyggari menning, veitir vegleiðandi meginreglur fyri menningarsamstarv. Uttanríkisráðharrin undirstrikaði tvey øki, dentur skal verða lagdur á, nevniliga tey øki, har íslendskur serkunnleiki kann nýtast á bestan hátt, til at vegleiða og samstarva við menningarlond, m.a. innan fiskiídnað og jarðhita. Eisini skulu tey kanna um tað er møguleiki at arbeiða saman við privatu vinnuni við menningarætlanum. Tann almenni peningurin er í roynd og veru ikki nóg mikið til at røkka altjóða menningarmálunum, tað er eisini neyðugt við privatari fígging. Menningarsamstarv er ein framtíðaríløga. Tey fremstu veitingarlondini og fleirtjóðaðu fyritøkurnar í menningarsamstarvi, arbeiða nú málrættað fyri at samstarva við privatu vinnuna.

Í frágreiðingini verður eisini nomið við Føroyar. Nevnt verður m.a. grannasamstarvið millum Ísland, Grønland og Føroyar, arbeiðið við fríhandilsavtalu við Grønland og Føroyar, at finna loysnir á útistandandi málum viðv. Hoyvíkssáttmálanum, landgrunnsmálið við m.a. Føroyar um Hatton Rockall-økið.

*Sí meira her (samandráttur á enskum) og øll frágreiðingin her (á íslendskum)*

## ISK STYRKT NÓGV OG SKJÓTARI ENN VÆNTAÐ




*Mynd 2. Íslendska krónan er hækkað út við 40% seinastu 2 ½ árini.*

Virðið á íslendska gjaldoyranum er søguliga høgt. Virðið er hægri enn tað var í 2007, og tað skal ikki nógv til, áðrenn gjaldoyrað verður líka høgt sum í 2005. Keypiorkan hjá íslendingum í fremmandum gjaldoyra, hevur ikki verið størri seinastu 10 árini. Tað sæst, tá hugt verður eftir veruliga virðinum á gjaldoyranum, ið er roknað út frá lutfallsligum brúksvirði millum Ísland og samhandilslond tess. Hetta er hvat íslendingar kunnu keypa í útlandinum í mun til, hvat tey fáa fyri pengarnar í Íslandi. Leitast skal heilt aftur í 80'ini fyri at síggja líka høgt tal á virðinum á gjaldoyranum. Hetta er bæði tí, at íslendska krónan er styrkt og at fleiri av gjaldoyrunum í samhandilslondunum eru viknað.
Sterka íslendska gjaldoyrað er farið at ávirka íslendskar fyritøkur, og harvið arbeiðspláss, neiliga, sigur Benedikt Jóhannesson, fíggjarmálaráðharri. Gjaldoyravirðið er hækkað støðugt seinastu vikurnar, og hetta var ikki tað, ynskt varð, tá kapital bindingarnar vórðu tiknar av í mars. Hann er stúrin um krónuna og heldur tað vera neyðugt at binda hana til útlendskt gjaldoyra. Benedikt Jóhannesson sigur seg kenna, at arbeiðsgevarar óttast sterku krónuna. Broytingin í krónuni hevur gingið skjótari enn óttast varð. Sterka krónan hevur tann fyrimun, at innflutt vøra verður bíligari og til ber at fáa bíligari uttanlandsferðir nú enn fyrr.

Somuleiðis spennir hetta bein fyri íslendskum fyritøkum og er soleiðis ein hóttan móti starvinum hjá hópin av borgarum. Ísland er ikki eins kappingarført, sum tað átti at verið, og tá eru vit komin út á vandamiklar gøtur.
Stefán Broddi Guðjónsson, leiðari á búskapardeildini hjá Arion banka sigur, at tað eru tvær orsøkir til at gjaldoyrað er vorið so høgt. Ein orsøk er, at íslendingar keypa fleiri útlendskar vørur fyri sína inntøku. Hin orsøkin er, at útlendingar skulu arbeiða longur, fyri at kunna keypa íslendska vøru og tænastu, og er tað bæði galdandi, tá ein er ferðandi í Íslandi, og tá fólk keypa íslendska vøru uttanlands. Hetta er jaligt fyri íslendskar løntakarar, ið gjalda minni av sínari løn, enn áður fyri útlendskar vørur. Hinvegin kann hetta vera ein trupulleiki, tí sterka virðið á krónuni kann hava ávirkan á avgerðir hjá útlendskum fyritøkum og ferðafólki um, hvar tey keypa í framtíðina. Sterka gjaldoyrað ger støðuna verri og minkar um kappingarførið hjá fyritøkunum og løntakarunum.

*Sí meira her og her (á íslendskum)*

## ÍSLAND HEVUR TØRV Á 2.000 ÚTLENDINGUM UM ÁRIÐ




*Mynd 3. Guðrún Hafsteinsdóttir, formaður í SI.*

Ísland hevur tørv á 30.000 útlendingum til arbeiðis tey næstu 15 árini, fyri at nøkta tørvin á vantandi arbeiðsmegi. Hetta meta fleiri vinnulívsleiðarar.
Forkvinnan í Ídnaðarfelagnum, Guðrún Hafsteinsdóttir, segði á ársaðalfundinum hjá SI (Samtök Iðnaðarins – Ídnaðarfelagið), at fólkatalsfrøðiligu broytingarnar í Íslandi gera, at tað er neyðugt at fáa arbeiðsmegi uttanlands frá.
Í dag er býtið soleiðis, at tað eru seks fólk í arbeiðsførum aldri fyri hvønn pensjónist. Hetta býtið verður broytt næstu 25 árini soleiðis, at tað verða trý fólk í arbeiðsførum aldri fyri hvønn pensjónist, metir Guðrún Hafsteinsdóttir. Vit hava tørv á útlendskari arbeiðsmegi, bæði faklærda og ikki faklærda metir forkvinnan í SI, ið er eitt felag, sum fevnir um 1.400 fyritøkur og sjálvstøðugt vinnurekandi og hevur til endamáls at styrkja samarbeiðið millum íslendskar fyritøkur.
Um búskapurin veksur í tráð við metingarnar, er neyðugt við umleið 2.000 fólkum hvørt ár. Víðari sigur Guðrún Hafsteinsdóttir, at nógvir íslendingar eru fluttir til onnur lond seinastu árini. Vit vilja gjarna hava møguleikan til at fara í onnur lond at arbeiða og taka hendan møguleikan fyri givið, men sama er ikki galdandi, tá ið útlendsk arbeiðsmegi skal koma til Íslands.

*Sí meira her (á íslendskum)*

## ÍSLAND HEVUR NÆSTBESTU HEILSUSKIPAN Í HEIMINUM



*Mynd 4. Landspítali í Reykjavík, ið er eitt universitets sjúkrahús*

Ísland hevur næstbestu heilsuskipan í heiminum, sambært eini umfatandi kanning av heilsuskipanum kring heimin. Úrslitið bleiv kunngjørt í The Lancet, ið er elsta og millum mest virdu læknatíðarrit í heiminum.
Útrokning av heilsuvísitølum er gjørd í mun til góðsku og atgongd til heilsutænastu, við atliti at tali av deyðum vegna sjúku, ið til ber at gera nakað við.
Sambært niðurstøðurnar í kanningini, er Ísland nummar tvey við einum indekstali á 94 út av 100. Sveis, Svøríki og Noreg fylgdu eftir Íslandi. Andorra gjørdist nr. eitt við einum indekstali uppá 95.

*Sí meira her (frágreiðingin á enskum)*

## TAKA AV BÍÐILISTAR Í HEILSUVERKINUM



*Mynd 5. Óttar Proppé, heilsumálaráðharri*

Heilsumálaráðharrin, Óttarr Proppé, sigur seg fara at gera eina samskipaða roynd til at taka av bíðilistarnar innan tað íslendska heilsuverkið. Tann besti hátturin at handfara hetta er, at økja um játtanina og stuðulin til sjúkrahúsini.
Tað eru serliga bíðilistar til skurðviðgerðir, ið ikki eru bráðfeingis skurðviðgerðir, so sum eygnaskurðviðgerðir, knæskurðviðgerðir o.a., ið verða sett aftur í røðina, tá bráðfeingis skurðviðgerðir koma í millum, sigur heilsumálaráðharrin.
Arbeiðið við at stytta um bíðitíðina til skurðviðgerðir, byrjaði fyri einum ári síðan, tá tingið tók avgerð um at seta 840 mió. ISK (~55 mió. DKK) av hvørt ár, trý tey næstu árini, við tí endamáli at minka um bíðitíðina í sjúkrahúsverkinum.

*Sí meira her (á íslendskum)*

## ÍSLAND HEIMSINS FRIÐARLIGASTA LAND FYRI 10. FERÐ Á RAÐ




*Mynd 6. Ísland er aftur kosið heimsins friðarligasta land á 10. sinni á rað.*

Fyri 10. ferð á rað, er Ísland kosið sum heimsins mest friðarliga land. Hini londini, sum eisini stóðu seg væl í kanningini, eru New Zealand, Portugal, Eysturríki og Danmark. Ísland er einasta landið av topp fimm londunum, ið eisini er í topp fimm listanum yvir lond, ið hava minst hernaðarliga megi. Ísland hevur ongan her. Størsta afturgongdin í tølunum hjá Íslandi kemst av korruptión. Í evropa er hend ein týðandi broyting í mun til korruptión tey seinastu 10 árini, fleiri korruptiónsgølur vórðu avdúkaðar, m.a. í Spania, Frankaríki og Íslandi. Serliga íslendsku tølini broyttust nógv, og tað kemst m.a. av fíggjarkreppuni og Panama gøluni, ið m.a. tann íslendski forsætisráðharrin var ein partur av. Kanningin fevnir um 163 lond. 93 lond vístu framgongd, meðan 68 lond vístu eina afturgongd. Tilsamans er heimurin vorðin 0,28% friðarligari tað seinasta árið, ið er ein lítil framgongd. Verður hugt at 10 teimum seinastu árunum samanlagt, er tó meiri ófriður nú enn fyrr. Tað minst friðarliga landið er Sýria, saman við Afganistan, Irak, Suður Sudan og Yemen.

*Sí meira her (frágreiðingin á enskum)*

## ÍSLAND VINNUR MUNANDI MEIRA VIÐ AIRBNB



*Mynd 7. Íslendskir Airbnb útleigarar fáa munandi størri inntøkur enn aðrir.*

Íslendskir Airbnb útleigarar vinna meiri pening enn útleigarar í øðrum londum, í miðal 16.500 USD meira. Hetta er tilsamans 1,6 mió. ISK (~100.000 DKK) um árið, fyri hvørja íbúð í miðbýnum. Samlaða inntøkan fyri Reykjavík í fjør var 5,3 mia. ISK (~350 mió. DKK). Hetta sæst í tølum frá dr. Jeroen A. Oskam, ið hevur kannað framtíðargongdina í ferðatænastu, og leiðir Framtíðarstovn ferðatænastunnar við Stendan háskúlan í Hollandi.
Sambært upplýsingunum frá Oskam, vinna íslendskir Airbnb útleigarar í miðal 3.500 USD meira um árið, enn teir útleigarar, sum vinna næstmest í heiminum, tað er í Westminster økinum í London. Útleigarar í Barcelona, har sera stórur ferðafólkastreymur hevur verið í mong ár, vinna umleið 8.600 USD um árið, hetta er áleið helvtina minni enn íslendskir útleigarar vinna.
Tað, sum er mest óvæntað viðvíkjandi Reykjavík er, at í mun til hvussu lítil høvuðsstaðurin er, samsvarar lutfallið av gestum, sum brúka Airbnb, ikki við aðrar høvuðsstaðir. Í 2015 vóru 1,1 millión Airbnb gestir í Amsterdam og 200.000 gestir í Reykjavík. Amsterdam er seks ferðir so stórur sum Reykjavík, sigur Oskham.

Talan var um eina stóra øking frá 2015 til 2016, tá 380.000 fólk leigaðu Airbnb íbúðir í høvuðsstaðnum í Reykjavík. Umleið 75% av øllum Airbnb íbúðunum í Reykjavík eru í Vesturbýnum, Miðbýnum og Hlíðum.
Hetta hevur eina neiliga ávirkan á bústaðarmarknaðin, íbúðarprísirnir hækka, og vanligi borgarin er í kapping við Airbnb gestirnar um at fáa íbúðir.
Av tí at Reykjavík er so lítil, er torført at gera eina samanbering við aðrar evropeiskar býir, so sum Rotterdam við 616.000 íbúgvum og Haag við 510.000 íbúgvum, sum seinastu árini hava havt meira enn helvtina færri Airbnb gestir enn Reykjavík. Yvir 5.000 íbúðir í Reykjavík eru til leigu gjøgnum Airbnb. Meira enn helvtin av Airbnb útleigarum, 51,3%, hava meira enn eina íbúð til leigu.

*Sí meira her (á íslendskum)*



*Mynd 8. Næmingar frá Glasi í Hoydølum á vitjan*

## VITJAN AV NÆMINGUM ÚR GLASI

3. og 4. mai hevði sendistovan vitjan av næmingum úr miðnámsskúlanum Glasi í Hoydølum í Tórshavn. Flokkarnir vóru í Íslandi á námsferð og vóru í tí sambandi og vitjaðu sendistovuna, har Poula Lassen, starvslesandi, hevði framløgu og greiddi frá íslendskum viðurskiftum. Greitt varð frá um búskaparviðurskifti, ferðavinnu og íslendska samfelagið. Eftir framløguna var áhugavert kjak, spurningar o.a. millum næmingar, lærarar, starvslesandi og sendimannin.



*Mynd 9. Borgarstjóri og starvsfólk frá Þorlákshöfn á vitjan*

## VITJAN AV BÝRÁÐNUM Í ÞORLÁKSHÖFN

Í mai mánað kom borgarstjórin í Þorlákshöfn saman við starvsfólkum sínum á vitjan í Sendistovuni. Tey vildu gjarna hoyra um føroysk viðurskifti í breiðasta týdningi. Í apríl í ár er nýggj farmaflutningsruta sett á stovn, Þorlákshöfn – Rotterdam – Tórshavn – Þorlákshöfn, sum M/F Mykines hjá Smyrilline røkir. Hetta samband hevur fingið góða undirtøku og áhugin fyri Føroyum er vaksin munandi í økinum.

## ALARM.FO GJØRT NÝTSLU AV HÝSINGARSKIPANINI

Alarm.fo, ið er ein føroysk kt-fyritøka, sum selur alarm skipanir, var í mai í Íslandi og helt til í Sendistovuni í eina viku og gjørdi nýtslu av hýsingarskipanini hjá Sendistovuni. Alarm.fo luttók í B2B ráðstevnuni, ið skipað varð fyri í Reykjavík í mars mánaði í ár. Sum uppfylging av hesum, so gjørdi Alarm.fo av at koma til Ísland og fylgja upp á tey sambond o.a., sum fingin vóru tá, og eisini at fáa fatur í enn fleiri møguligum viðskiftafólkum.
Fleiri og týðandi nýggj sambond vórðu knýtt afturat teimum, sum fingin vóru, tá ið Alarm.fo luttók í B2B ráðstevnuni í mars mánaði.

**SENDISTOVA FØROYA Í REYKJAVÍK**
**TÚNGATA 14**
**101 REYKJAVÍK**

Tlf. +354 511 3200 T-postur: reykjavik@uvmr.fo
www.uvmr.fo Finn okkum á Facebook